UTTAN ÚR HEIMI

# Ein trúgvur vinur leggur frá sær

**Felags fyri nógvar íslendskar politikarar er, at teir eru Føroyavinir. Halldór Ásgrímsson, sum nú leggur frá sær sum forsætisráðharri og floksformaður, er einki undantak - heldur tvørturímóti**

ÍSLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hóast nøgvir íslendingar vistu, at eitt ella annað fór at henda í Framsóknarflokkinum eftir tað vánaliga kommunuvalið hjá flokkinum herfyri, kom tað óvart á mong, tá formaðurin, Halldór Ásgrímsson, fyrrakvøldið kunngjørdi, at hann hevði gjørt av at fara frá. Ikki bara sum formaður í Framsóknarflokkinum, men eisini sum forsætisráðharri.

Halldór kundi valla havt valt sær eitt meiri hóskandi stað at kunngera avgerð sína, tí hon kom eftir ein fund, sum floksleiðslan og tingmanningin hjá Framsóknarflokkinum hildu á Þingvøllum fyrrakvøldið. Hann segði, at valúrslitið á kommunuvalinum var ikki nóg gott, og at hann hevði gjørt av at átaka sær ábyrgdina av tí, soleiðis at nýggjar kreftir kundu sleppa at royna seg eftir ársfundin hjá Framsóknarflokkinum, sum verður í heyst. Sjálvur verður hann sitandi til ta tíð.

Samstundis boðaði hann frá, at hann leggur eisini frá sær sum forsætisráðharri, men at hann fer at halda fram sum altingsmaður til næsta val, sum verður aftur til várs.

Nýggjur forsætisráðharri verður Geir Haarde, formaður í Sjálfstæðisflokkinum, sum higartil hevur verið uttanríkisráðharri. Hann og Halldór Ásgrímsson skulu nú tingast um, hvørjir ráðharrar skulu halda fram í stjórnini, og hvørjir skulu skiftast út.

## Royndur politikari

Tað er ein maður við drúgvum og sera fjølbroyttum royndum, sum nú fer burtur úr íslendskum politikki.

Halldór Ásgrímsson, sum er ættaður av Vopnafirði á Eysturlandinum, varð fyrstu ferð valdur í Altingið í 1974 sum tingmaður fyri Eysturlandið. Í 1979 varð hann afturvaldur har og hvørt val til 2003, tá hann gjørdi av at stilla upp í Reykjavík, har hann eisini varð valdur. Í 1994 varð hann valdur til formann í Framsóknarflokkinum.

Hann gjørdist fyrstu ferð ráðharri í 1983 og fekk fiskivinnumál at umsita, og tað málsøkið umsat hann til 1991. Men hann røkti eisini onnur málsøki í hesum tíðarskeiði. Frá 1985 til 1987 var hann eisini ráðharri í norðurlandamálum, og hann var løgmála- og kirkjumálaráðharri frá 1988 til 1989. Í 1995 varð hann valdur til uttanríkisráðharra, og tað embætið røkti hann til 2004, tá hann gjørdist forsætisráðharri.



*Halldór Ásgrímsson.*



*Í vár skrivaðu Halldór Ásgrímsson og Jóannes Eidesgaard, løgmaður, undir Hoyvíkarsáttmálan. Tá fekk løgmaður innbjóðing til at koma á almenna vitjan í Íslandi, men nú verður tað hjá øðrum verti*

Hann var eisini samstarvsráðharri í norðurlandamálum frá 1995 til 1999, og júst norðurlendskt samstarv hevði hansara stóra áhuga. Hann var eitt av umboðum Íslands í Norðurlandaráðnum frá 1977 til 1978, 1980 til 1983 og aftur frá 1991-1995, tey bæði seinastu árini sum formaður í miðflokkabólkinum í ráðnum.

Sum altingsmaður hevur hann millum annað verið limur í fíggjarnevndini, uttanríkisnevndini og fiskivinnunevndini Hann hevur eisini verið formaður í nevndini í Seðlabanka Íslands.

## Trúgvur Føroyavinur

Tað eru bert tveir mánaðir, síðani Halldór Ásgrímsson var í Føroyum og skrivaði undir Hoyvíkarsáttmálan saman við Jóannesi Eidesgaard, løgmanni.

– Eg kom at kenna hann í tíðliga í nítiárunum, tá hann var ráðharri og eg landsstýrismaður í norðurlendskum viðurskiftum, og eg fekk varhugan av, at hann var ein hóvligur og skilagóður politikari, sum gekk nógv upp í norðurlendskt samstarv, sigur løgmaður.

- Halldór var ein trúgvur Føroyavinur og legði sum politikari dent á gott vinarlag við føroyingar eins og undanmaður hansara Dávið Oddsson, sigur Jóannes Eidesgaard, ið ikki væntar nakra broyting, nú Geir Haarde tekur við.

# Hann fær trupla uppgávu

**Komandi íslendski forsætisráðharrin fær nóg mikið at takast við**

ÍSLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tey ótryggu búskaparútlitini í Íslandi vóru sambært eygleiðarum ein orsøk til, at Halldór Ásgrímsson, forsætisráðharri, gjørdi av at fara frá, og tí er einki at ivast í, at eftirmaðurin, Geir Haarde, fær nóg mikið at takast við.

Tað er heldur einki at siga til, at nógvir íslendingar eru farnir at ivast í búskapinum. Tey bæði seinastu árini hevur Seðlabankin hækkað rentuna heilar fjúirtan ferðir fyri at tálma inflasjónini. Annan hvítusunnudag kunngjørdi Standard & Poor, at tað gongur tann skeiva vegin, og dagin eftir kunngjørdi íslendska hagstovan, at hallið í samhandlinum við umheimin er nógv størri higartil í ár enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Danske Bank, sum hevur havt nakrar daprar spádómar um íslendska búskapin í seinastuni, sigur nú, at útlitini versna skjótari nú, enn bankin segði fyri bara einum mánað síðani.

Ein uggi hjá íslendingum er tað kanska, at Geir Haarde má sigast at vera væl egnaður til uppgávuna at venda búskapinum. Hann hevur verið fíggjarmálaráðharri tey seinastu sjey árini.



*Geir Haarde fær sambært eygleiðarum brúk fyri sínum drúgvu royndum sum fíggjarmálaráðharri, nú hann verður forsætisráðharri*